

## Høgni Hoydal rindar ikki sjónvarpsgjald

- Eg havi ongantíð fingið nakað uppkrav, so eg havi ikki verið varin við trupulleikan, sigur Høgni Hoydal, nú danska Ekstrablaðið skrivar, at føroyska fólkatingsumboðið ikki hevur rindað sjónvarpsgjald.

Undir yvirskriftini “Danske politikere licens-snydere” ber danska Ekstrablaðið í dag tíðindi um, at annað føroyska fólkatingsumboðið, Høgni Hoydal, ið hevur leiguíbúð í Keypmannahavn, ikki hevur rindað sjónvarpsgjald.

- Eg havi ongantíð fingið nakað uppkrav, so eg havi ikki verið varin við trupulleikan. Eg havi eitt sjónvarp í leiguíbúðini og eitt á skrivstovuni á Christiansborg, sigur Høgni Hoydal, ið nú lovar at rinda sjónvarpsgjald eins og aðrir danskir sjónvarpshyggjarar.

Høgni Hoydal hevur annars ikki nógv til yvirs fyri danska Ekstrablaðnum.

- Hetta er ikki meir enn ein roynd at skriva skandalujournalistik, sigur Høgni Hoydal.

Greinin kemur í kjalarvørrinum av gøluni í Svøríki, har fleiri ráðharrar noyddust at fara frá, eftir at tað kom fram, at teir ikki høvdu rindað sjónvarpsgjald.

Umframt Høgna Hoydal verður skrivað, at bæði grønlendsku umboðini, Lars Emil Johansen og Kuupik Kleist, heldur ikki hava rindað.

# a orsøkina



*– Hetta er tað, sum vit mugu liva við í hesi modernaðu verðini, har alt skal endavendast, hóast tú stórliga kann ivast í, hvønn týdning tað hevur fyri tað, sum er hent, sigur Magni Arge, sum er sera hamur um viðferðina, sum føroyska felagið hevur fingið í norsku miðlunum*

Summi starvsfólk hjá Aker hava eisini havt hvassan kritikk mótvegis Atlantsflog og róð framundir, at Aker eigur at siga sáttmálan við Atlantsflog upp.

– Tað er væl skiljandi, at ein ólukka loypir ótta á fólk, og tí er tað ein uppgáva hjá okkum at sannføra fólk, um at tað framvegis er trygt at flúgva við okkum. Formelt er hetta álit staðfest hjá eftirlitsmyndugleikanum, men reelt er tað bert viðskiftafólkini, sum koma umborð á flogførini, sum staðfesta hetta álit, sigur Magni Arge.

Hann vísir eisini á, at í Noregi hevur umtalan av felagnum nærmast ment seg til eina hetz, har alt møguligt verður rørt í ein pott og brúkt til at sáða misálit.

– Aker má sjálvsagt fyrihalda seg til bæði sakkunnleikan og ótta ella øsing millum tey, sum skulu flúgva við flogførunum. Aker og Atlantsflog arbeiða saman um at sissa fólk. Flúgvingin fyri Aker minkar í vetur og fellur burtur út á várið, tá Snøhvitt og Ormen Lange verkætlaninar eru at enda komnar.

– Enn hava vit ikki fingið nakran nýggjan sáttmála, men vit gera sjálvandi alt fyri at finna aðrar rutur úti í heimi, tí hetta er sera umráðandi fyri felagið, sigur Magni Arge.

*Hvussu hevur vanlukkan ávirkað Atlantsflog innanhýsis? Og hvørja hjálp hava starvsfólkini fingið. Hvørja tilbúgvingarætlan hevur felagið?*

Hendan vanlukkan hevur sjálvandi merkt øll starvsfólkini hjá Atlantsflog. Magni Arge sigur, at ein partur av tilbúgvingarætlanini í hesum føri var at taka hond um starvsfólkini, upplýsa tey um, hvat hendi og bjóða teimum kreppuhjálp, ið høvdu tørv á tí.

– Vit høvdu eisini eina minningarløtu í hangarinum, tá kistan við Guðrun kom heim, og vit hava eisini verið í Stord saman við familjuni hjá Guðrun, sigur hann.

Magni Arge sigur, at hann sjálvur var staddur í Noreg teir fyrstu dagarnar, men hann hevur skilt, at tey, ið stóðu fyri tilbúgvingini heima hava gjørt eitt dygdargott arbeiði.

*Hava tit merkt nakað til, at ferðafólk hava vent tykkum bakið?*

– Nei, tað hava vit als ikki. Tvørturímóti hava vit kent stuðul og stóra samkenslu frá Føroya fólki, sum vit eru sera takksom fyri.

*– Hvussu hevur tú havt tað persónliga eftir vanlukkuna?*

– Mín persónur er ikki so áhugaverdur í hesum. Eg eri ikki tann, sum havi mist mest, so tað er ikki synd í mær, men tað hevur verið ótrúliga hart. Eg vakni hvønn morgun og vóni, at hetta bara var ein óndur dreymur, men tað er tað ikki – hetta er tann beiski veruleikin, sigur Magni Arge.

– Men eg kenni stóran ugga í, at familjan hjá Guðrun hevur havt so stórt yvirskot til at hugsa um okkum í sorgini. Tey hava eggjað okkum til at halda á og ikki missa mótið, tí Guðrun var so glað fyri sítt arbeiðspláss. Tí kenna vit í felagnum tað sum eitt kall, at øll – frá ovast til niðast – standa saman og stríða okkum gjøgnum hetta ódnarveðrið og tryggja felagnum eina góða framtíð, sigur Magni Arge.

*Norsku fjølmiðlarnir hava ikki verið so mjúkir við Atlantsflog, hvat sigur tú til tað?*

– Hetta er tað, sum vit mugu liva við í hesi modernaðu verðini, har alt skal endavendast, hóast tú stórliga kann ivast í, hvønn týdning tað hevur fyri tað, sum er hent, sigur Magni Arge, sum er sera hamur um viðferðina, sum føroyska felagið hevur fingið í norsku miðlunum.

– Men tað mest umráðandi er at staðfesta, hvør orsøkin til vanlukkuna var, so vit kunnu tryggja okkum, at ein slík vanlukka ikki hendir aftur. Vit renna ikki undan ábyrgdini, men nú hava vit brúk fyri einum andarhaldi, so vit fáa frið at arbeiða við hesum málinum, sigur Magni Arge.

**STUTT SAGT**

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog:

## Høvdu kanska sloppið undan miðlastorminum

**- Vit hava handfarið málið við Hans Hansen rætt. Spurningurin millum operatør og myndugleikan er avgerandi. Á SLV staðfestu tey avgerðina um at siga leiðaran úr starvi við nøgdsemi**

ATLANTSFLOG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í gjár kom fram, at Hans Hansen, flogovasti hjá Atlantsflog varð koyrdur úr starvi eftir at felagið fekk átalu frá Statens Luftfartsvæsen. Vit hava spurt Magna Arge, stjóra í Atlantsflog, hví einki hevur verið at frætt um hetta:

– Vit mettu, at talan var um eitt starvsfólkamál, sum ikki var alment. Slík mál eru altíð eym. Hans Hansen hevur gjørt eitt sera stórt arbeiði fyri Atlantsflog øll árini, sigur Magni Arge.

– Hans Hansen var farin frá sum flogskipari fyri aldur, og eitt generatiónsskifti var á veg – og tað valdu vit at gjøgnumføra við hetta høvi, sigur Magni Arge.

Stjórin í Atlantsflogi heldur, at felagið hevur handfarið málið rætt. Spurningurin um álit millum operatør og myndugleika er heilt avgerandi.

- Vit kundu farið í eitt kjak við myndugleikan um málið, men í semju við fráfarna ovastan valdu vit ikki at gera tað, men heldur gjøgnumføra ættarliðsskiftið umgangandi, so álitið var hildið intakt. Tað hevði verið ein løgin takk at givið fráfarna ovastanum, sum síðani byrjan hevur verið ein hornasteinur í felagnum, um vit almannakunngjørdu hesa sak. Hon var avgreidd uttan drál, so felagið varðveitti síni góðu viðurskifti við myndugleikan, sigur Magni Arge.

Eftirfylgjandi kann hann staðfesta, at um tey høvdu sagt hetta tá, so var miðlastormurin ikki so stórur um hetta málið í dag.

Hans Hansen hevur enn ávíst tilknýti til felagið – eitt nú verður hann brúktur sum »ferjuflogskipari« – tað er at flúgva flogfør uttan ferðafólk.

Í Statens Luftfartsvæsen sigur kunningarstjórin, Torben Anker soleiðis.

– SLV hevur eftirlit við flogfeløgum í danska kongaríkinum, og tað var undir einum av hesum eftirlitum, at vit gjørdust varug við nøkur frábrigdi ella avvik í trygdini hjá flogfelagnum, greiðir Torben Anker frá.

– Hetta gjørdu vit síðani eina frágreiðing um, har vit vístu á nøkur ting, sum máttu fáast í rætt lag.

Hans Hansen boðaði seinni frá, at nú vóru hesi tingini rættað, men tað vísti seg ikki at vera rætt.

– Tá tað er soleiðis, at flogovastin sigur seg hava rættað nøkur ting, ið hann hevur fingið álagt, men ikki hevur gjørt tað at líka væl, so kunnu vit ikki hava álit á honum, og tað boðaðu vit leiðsluni hjá Atlantic Airways frá, sigur Torben Anker.

– Vit staðfestu so við stórum nøgdsemi, at Atlantic Airways handlaði beinanvegin og tók fylgjurnar av hesum.

*Merkir tað, at flogovastin í leyg fyri Statens Luftfartsvæsen?*

– Nei tað merkir tað ikki neyðturviliga. Tað kann eins væl merkja, at flogovastin ikki hevði stýr upp á ella hevði tamarhald á sínum øki, sigur Torben Anker.

Hann sigur eisini, at støðan hjá Atlantic Airways við, at flogovastin varð koyrdur frá, er eitt gott dømi um, at skipanin riggar sum hon skal, har tann við evstu ábyrgdini mátti bøta fyri, at trygdin var í lagi.